Millum undirritaða

**Eigarafelagið Hamarin**
**v/ Hans Petersen**
**160 Argir**

og medundirritaða

**Eigarafelagið Undir Kongavarða**
**v/Marjun Hentze**
**160 Argir**

er í dag inngingin hesin

# SAMOGNARSÁTTMÁLI

viðvíkjandi felags antennuskipan fyri øll húski uppi á Hamaranum á Argjum og øll húski Undir Kongavarða á Argjum.

Hesin samognarsáttmáli er inngingin undir hesum

**- treytum -**

§ 1

Eigarafelagið Hamarin hevur í 2008 keypt og ment eina antennuskipan fyri limir felagsins, sum eru øll húski búgvandi uppi á Hamaranum.

Útgerðin er keypt frá Opus Fa. v/Kai Johannesen, 620 Runavík

Útgerðin, sum Eigarafelagið Hamarin hevur keypt, er henda:

| | | |
|---|---|---|
| | **Høvuðsstøð 37 rásir + Info og 4 digital Radio** |
| 3 | HSA-X-8-BASIS-B Grundeind |
| 1 | Astro X DVB-T singel A2 stereo Conax (SVF) |
| 17 | Astro X DVB-S twin A2 stereo Conax |
| 35 | CA modul |
| 2 | Astro DVB SAT. Twin FM |
| 1 | AV modulatorar ( info rás) |
| 1 | Astro analog SAT. Twin Inb. Modulator |
| 1 | Astro kontroll einheit HSA |
| 2 | FM twin kanalumsetari |
| 2 | Parabol 1,8m v/Az beslag |
| 1 | Parabol 1,2m v/Az beslag |
| 3 | LNB Dygiality |
| 1 | FM antenna |
| 1 | VHF antenna |
| 1 | Koblingsforsterkari |
| | Fordeilarar, káplar,stikk og annað til støðina |
| 1 | Sjónvarp |
| 1 | Harddiskur |

Eigarafelagið Hamarin hevur eisini bygt eitt hús at hýsa antennuskipanini. Húsið stendur á leigugrund matr.nr. 4cn, Argir. Húsið verður framhaldandi ogn hjá Eigarafelagnum Hamarin.

Antennufelagið hevur ábyrgd fyri og ber kostnaðin av at útvega og til hvørja tíð at varðveita samband millum býlingarnar á Hamarinum og undir Kongavarða.

Eigarafeløgini hava hvør sær ábyrgdina fyri og bera kostnaðin av netinum millum húsini á egnum økjum.

§ 2

Endamálið við hesi samognaravtalu er at leggja ognarrættin til alla antennuskipanina við allari tilhoyrandi útgerð, nevnd í § 1 í eitt íognarfelag, nevnt "Antennufelagið fyri Hamaran og Undir Kongavarða".

Við hesi avtalu verður sostatt øll útgerð, øll rættindi og allar skyldur avhendar til íognarfelagið Antennufelagið fyri Hamaran og Undir Kongavarða fyri eina samlaða upphædd áljóðandi kr. 500.000.

Útgerðin verður avhendað til íognarfelagið uttan nakra pantiskuld, ella aðrar fíggjarligar skyldur.

Tað er at viðmerkja, at húsið, har antennuskipanin stendur ikki er umfatað av hesi avhending. Partarnir eru samdir um, at íognarfelagið skal hava rætt til ókeypis at hava antennuskipanina standandi í hesum húsum. Verður antennuskipanin flutt at standa undir Kongavarða, játtar Eigarafelagið undir Kongavarða at vilja veita antennuskipanini ókeypis innivist í hóskandi hølum.

Antennufelagið rindar útreiðslur, ið standast av at hava antennuskipanina standandi í húsunum, herundir streym, samskiftisútreiðslur v.m.

§ 3

Eigarafelagið Undir Kongavarða keypir við hesi avtalu helmingin av íognarfelagnum til "Antennufelagið fyri Hamaran og Undir Kongavarða" frá Eigarafelagnum Hamarin fyri eina upphædd áljóðandi kr. 250.000.

Upphæddin verður goldin soleiðis, at Eigarafelagið Hamarin forlods fær útgoldið alt avlop, sum raksturin av antennuskipanini gevur, til skuldin er fult goldin. Renta verður ikki goldin.

§ 4

Partarnir eru samdir um, at íognarfelagið Antennufelagið Hamarin og Undir Kongavarða verður stjórnað samsvarandi viðtøkum, sum verða viðfestar hesi samognaravtalu sum skjal 2.

§ 5

Eigarafelagið Undir Kongavarða yvirtekur íognarpartin í Antennufelagnum Hamarin frá og við 1. januar 2010 at rokna.

Við hesum degi sum skeringsdegi yvirtekur íognarfelagið samstundis alla ogn og allar skyldur viðvíkjandi antennuskipanini. Eigarafelagið Hamarin váttar at hava fullan ognarrætt til antennuskipanina, og at felagið hevur rætt til at avhenda skipanina til íognarfelagið. Íognarfelagið rindar allan rakstur, herundir viðlíkahald og útreiðslur til trygging.

§ 6

Henda avtala verður undirskrivað í tveimum eintøkum, harav hvør parturin fær sítt eintakið.

Argir, tann 11/5 -2010

Hans Pedersen
Eigarfelagið Hamarin

Eigarafelagið Undir Kongavarða